H71-Neistin 24-31 (14-15):

# Neistin er avbjóðarin



*Neistin vann ruddiliga toppdystin ímóti H71. Nú tykist tað, sum tað verður Neistin, sum skal stríðast við VÍF í toppinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fyri fyrstu ferð í ár sýndi Neistin nakað av tí spæli, sum áskoðararnir hava væntað av liðnum í vetur, og so var ikki stórvegis, sum hoyvíkingar fingu gjørt fyri at steðga bláa grannafelagnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan var um rættan toppdyst, tá H71 og Neistin brustu saman sunnudagin. Saman við VÍF vóru hesi bæði liðini tey einastu, sum høvdu fingið fulla úrtøku úr fyrstu umførunum,

Dysturin snúi seg tí um, hvat av liðunum framvegis skuldi verða heilt frammi í oddinum komandi vikuna, og sum úrslitið vísur á, so eydnaðist tað Neistanum at vinna sær hendan rættin.

### Høvdu altíð munin

Neistin legði seg alt fyri eitt á odda, og fyrstu løtuna høvdu hoyvíkingar sera ilt við at sleppa inn um neistaverjuna, sum fyri fyrstu ferð í ár hevði eitt veruliga gott tak á mótstøðuliðnum.

Góða verjuspælið var sjálvsagt ein góður hornasteinur í neistaspælinum, og so líðandi fóru teir at draga burtur frá mótstøðuni.

Eitt skifti var munurin fýra mál, men eftir at H71 seinastu løtuna undir steðginum fór undir mansverju av Heina Joensen, fingu teir toga seg nakað væl innaftur á Neistan, soleiðis at munurin í hálvleikinum bert var eittans mál.

Í seinna hálvleiki hildu hoyvíkingar á við mansverjuni, men tað var tó sjónligt, at neistaliðið hevði nýtt hálvleikssteðgin til at tosa um, hvussu teir skuldu takla hetta.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki skryktu teir seg alt fyri eitt leysar av hoyvíkingunum, og vóru tað ikki minst Jacob Jónsson og Áki Mørk, sum dugdu at gera sær dælt av eyka plássinum, sum kemur í, tá spælt verður fimm móti fimm.

Í vejruni høvdu teir bláu framhaldandi eitt sera gott tak á stórskjúttunum hjá hoyvíkingum, og tá neistavenjarin so eisini kann velja ímillum tveir klassamálverjar, var tað sjálvsagt, at tað var trupult hjá H71 at vinna seg innaftur.

Viðvíkjandi málverjunum í dystinum, so er ananrs at siga, at tað kann tykjast eitt sindur løgið, at Neistin í ár hevur valt at fáa sær styrk frá tveimum útlendskum málverjum.

Orsøkin til hetta kann so ikki vera tann, at felagið ikki eigur nøkur góð evni. Í málinum hjá hoyvíkingum stóð nevnliga Levi Nybo, sum er uppvaksin í Neistanum, og hann var so avgjørt ein av orsøkunum til, at sigurin hjá Neistanum ikki gjørdist størri enn tað sama.

### Ein avbjóðari

Hetta nertir tó ikki við tað støðu, at skal metast eftir dystinum sunnudagin, so er talan í veruleikanum bert um ein avbjóðara til trúnuna hjá vestmenningum.

Í undanfarnu trimum dystunum hevur spælið hjá Neistanum verið lítið sannførandi, og teir hava so avgjørt ikki verið óhepnir at fáa tríggjar eitt-máls sigrar til høldar í hesum.

Sunnudagin sást tó nakað av tí spæli, sum skal til, um ætlaninar um ein sess í oddinum skulu gerast til veruleika. Í verjupartinum dugdu teir sera væl at byrgja upp fyri skjúttunum hjá mótstøðumonnunum, og tá hesir so kortini sluppu framat, høvdu teir so framvegis annan av útlendsku málverjunum hjá Neistanum at stríðast við.

### Fleiri um boðið

Í álopspartinum var spælið hjá Neistanum kanska ikki heilt so flótandi, men tað verður tað sjáldan, tá mótstøðuliðini seta týdningarmestu kortini úr spælinum við mansverju. Tað var tó í hesum sambandi sjónligt, at avrikið hjá Neistanum ikki í ov stóran mun er tengt at gerðunum frá einum ella tveimum leikarum.

Hóast bæði Heini Joensen og Jacob Jónsson skiftivís vórðu mansvardir, so dugdu hinir – serliga Áki, Kári og Hans Áki – so sanniliga eisini at finna vegin til meskarnar,

Akkurát hvussu langt alt hetta røkkur, er kanska eitt sindur ilt at siga, men tað er í øllum førum greitt, at Neistin hevur tekningina til nakað stórt liggjandi klára. Spurningurin er so, um tekningin er eins góð sum tann hjá vestmenningum, og tað svarið má so í øllum førum bíða til komandi sunnudag. Tá koma vestmenningar nevnliga til Havnar.

### Dysturin í tølum

**H71-Neistin 24-31 (14-15)**
Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olesen 7(1), Finnur Hansson 5(1), Janus Joensen 5, Hallur Danielsen 3, Bjarni Wardum 2, Olaf Vestergaard 1, Johnny Durhuus 1
Neistin: Kári Mortensen 8, Heini Joensen 7(3), Áki Mørk 6, Jacob Jónsson 5(2), Hans Áki Dal-Christiansen 3, Ári Rouch 1, Zeljko Jotic 1
Brotskøst: H71 3, Neistin 5
Útvísingar: H71 5, Neistin 7
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum. Kanska ikki teirra besti dystur, men myndugleiki teirra viðførdi tó, at teir ongan tíð mistu tamarhaldið á dystinum.

VB-Kyndil 30-26 (12-12):

# Kyndil stríddist til fánýtis

**VB var á odda mesta av dystinum og vann við fýra málum, tá Kyndil var á vitjan í Vági**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tað var VB, sum gekk undan, tá kvinnuliðið hjá Kyndli var á vitjan sunnudagin. VB fór fleiri ferðir frá Kyndli í fyrra hálvleiki, men havnaliðið stríddi seg aftur. Í seinna hálvleiki kláraði Kyndil tó ikki at standa ímóti.

Fyrstu fimm minuttirnar var VB fullkomiliga omaná, men so vaknaði Kyndil, og tá 10 minuttir vóru farnir stóð á jøvnum millum liðini aftur.

VB fór aftur fram um við fleiri málum, men Kyndlakvinnurnar bardu seg aftur upp á javnt, og tá liðini fóru til hálvleik, stóð á jøvnum – 12-12.

### Brendu brotskøst

Í seinna hálvleiki gjørdist VB-spælið alt meira ágangandi, tær fingu betri tak á verjuni, og sum dysturin leið gjørdist munur millum liðini.

Tá eitt korter var eftir at spæla hevði VB tikið leiðslu upp á fýra mál, og tað vóru eisini hesi mál, sum vóru á muni, tá dysturin var av.

Seinastu fimm minuttirnar av dystinum gjørdi Kyndil ein rættiliga endaspurt, og tær skoraðu átta mál hesa løtuna. Tær kláraðu tó ikki rættiligt at halda tætt í verjupartinum, og tí bar ikki til at náa VB, sum var farin fram um við átta málum.

Gabriella Fekete var enn einaferð avgerandi fyri VB-úrslitið, og hon gjørdi næstan helmingin av málunum hjá VB.

Tað kom Kyndil aftur um brekku, at tær brendu so ofta brotskøst. Tær fingu átta brotskøst í dystinum, men fimm teirra vórðu brend.

### VB-Kyndil 30-26 (12-12)

Málskjúttar:
VB: Gabriella Fekete 13 (4), Regina Rado 5, Gurið Mortensen 4, Durita Rouch 4, Margret Augustinussen 2, Sólrun Krosslá 1, Guðrun Midjord 1.
Kyndil: Lotte Sørensen 8 (3), Palma Petersen 5, Marjun Tróndarson 5, Erla Smidt 4, Laila Jespersen 2, Ann-Mari Wang 1, Anja Johannesen 1.
Brotskøst: VB 4, Kyndil 8
Útvísingar: VB 2, Kyndil 2
Dómarar úr Tjaldur: Kári Hansen og Trygvi Mortensen



VÍF-Stjørnan 25-22 (11-10)

# VÍF-breiddin sigraði



**Hóast Stjørnan fekk flúgvandi byrjan, so gjørdust føroyameistararnir drúgvari í toppdystinum í Vestmanna**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Heimaliðið fekk ein kvøkk, tá Stjørnan legði harðliga fyri og kom fram um 5-0, áðrenn nakar vardi.

VÍF var um ein háls hesa løtuna, og tá 21 minuttir vóru spældir av dystinum hevði VÍF bara fingið trý mál!

Føroyameistararnir úr Vestmanna kláraðu ikki at snýta sterku verjuna hjá Stjørnuna, og taktikkurin hjá Stjørnuni riggaði til fulnar fyrstu løtuna. Tað ráddi um at steðga Sóley Mikkelsen og Ioana Rapa, sum hava so nógv at týða fyri liðið, og tað eydnaðist í longum løtum.

Hóast líkt var til, at Stjørnan skuldi fara at taka alt við sær í dystinum, so broyttist myndin seinastu 10 minuttirnar fyri steðgin. Nú steðgaði Stjørnuliðið upp, meðan VÍF gjørdist alt meira ágangandi í álopsspælinum.

VÍF fór frá 3-8 til 11-8 eftir seks minuttum, og hesa løtuna trilvaði Stjørnuliðið bæði í verju og álopi.

### Stór breidd

VÍF legði eisini betri fyri í seinna hálvleiki, og Jórun Ludvig, sum hendan dagin var toppskjútti hjá VÍF, økti leiðsluna upp í trý mál.

VÍF helt seg frammanfyri og eina løtu var leiðslan fýra mál. Stjørnan fótaði sær enn einaferð, og tær minkaðu um leiðsluna til eitt mál, áðren Daniel Rapa tók time-out fyri at venda gongdini.

Seinastu minuttirnir gjørdust spennandi. Tá tveir minuttir vóru eftir at spæla var støðan 23-22 til VÍF, og alt kundi henda. Tað, sum hendi, var tó, at VÍF skoraði tvey mál afturat, meðan Stjørnan einki mál fekk.

Munurin millum liðini vísti seg at vera stóra breiddin hjá VÍF. Meðan tað eydnaðist Stjørnuni væl at steðga profilunum á VÍF-liðinum, hevur liðið so nógvar góðar spælarar, at tað er trupult at steðga liðnum fyri tað. Jórun Ludvig var toppskjútti hesaferð við átta málum, meðan fýra aðrir spælarar gjørdu fýra mál hvør.

Hjá Stjørnuni var tað enn einaferð Simona Dziugyte, sum var toppskjútti. Hon skoraði 10 mál og hevur nú gjørt 50 mál í fýra dystum!

Fyrsta styrkisroyndin millum bestu liðini í farna kappingarári vísti, at munurin ikki er stórur millum liðini í løtuni. Næstu ferð tey hittast verður í desember mánaði í Klaksvík.

### Dysturin í tølum:

**VÍF-Stjørnan 25-22 (11-10)**
Málskjúttar:
VÍF: Jórun Ludvig 8, Sóley Mikkelsen 4 (1), Ioana Rapa 4 (1), Jacklin Durhuus 4, Nicoleta Radu 4, Fríða Marjunardóttir 1
Stjørnan: Simona Dzuigyte 10 (7), Joan Midjord Joensen 5, Andrijana Milodanovic 5, Anna Kristina Samson 2.
Brotskøst: VÍF 3, Stjørnan 10
Útvísingar: VÍF 5, Stjørnan 4
Dómarar: Kristian Johansen og Pole Hansen

VÍF-Tjaldur 27-18 (11-9)

# VÍF ongar trupulleikar



**Menninir hjá VÍF vunnu tryggan sigur á Tjaldur, sum royndi at stríðast fyrra hálva tíman**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Hóast VÍF bara var á odda við tveimum málum í hálvleikinum, so var ongantíð veruligur vandi á ferð hjá føroyameistarunum. Teir hildu seg frammanfyri Tjaldur alla tíðina, og í seinna hálvleiki øktu teir støðugt um leiðsluna.

Tjaldur møtti við átta spælarum, og tað var bara ein ov nógv fyri at manna liðið á vøllinum. Hetta hevði ivaleyst við sær, at tað gjørdist strævið hjá runavíkingum at fylgja við, og í seinna hálvleiki dragnaðu teiri eisini.

VÍF gjørdi ikki nógv hóvasták burtur úr í fyrra hálvleiki. Teir høvdu í løtum trupulleikar við at spæla seg gjøgnum verjuna hjá Tjaldri, men teir høvdu allatíðina munin í dystinum.

### Tryggur sigur

Í seinna hálvleiki gjørdust umstøðurnar at spæla betri. Tað gjørdist longri millum málini hjá Tjaldur, samstundis sum verjan hjá runavíkingum var tagað alt meira sundur.

Ingi Olsen var sentralur á VÍF-liðnum, og hann bæði skoraði og spældi viðspælarar leysar. Og við góðum stuðli frá spælarum sum Sámal Joensen, Harald Bjørgvin og Áka Olsen var sigurin tryggur.

Tjaldur hevur framvegis fyrsta stigið til góðar í hesum kappingarárinum, meðan VÍF hevur vunnið allar sínar dystir.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Tjaldur 27-18 (11-9)**
Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 9, Sámal Joensen 5 (1), Harald Bjørgvin 4, Áki Olsen 3 (1), Ragnar Zachariasen 2, Agnar Joensen 2, Daniel Rapa 1, Rógvi Nielsen 1.
Tjaldur: Dragica Stojovic 7, Mortan Hansen 4 (1), Sverri Justinussen 4 (1), Zoran Sarcevic 1, Arnfinn Langgaard 1, Dia Lamhauge 1.
Brotskøst: VÍF 2, Tjaldur 6
Útvísingar. VÍF 4, Tjaldur 3
Dómarar: Kristian Johan - sen og Pole Hansen


Korrespondent / BA erhvervssprog i engelsk/tysk

POST Greenland, Filatelia, i den østgrønlandske by Tasiilaq (Angmagssalik) søger en korrespondent i engelsk og tysk til tiltrædelse den 1. december 2001 eller efter nærmere aftale.

Filatelia er en afdeling i POST Greenland med ca. 20 medarbejdere, der sælger og distribuerer frimærker samt filateliprodukter til alle posthuse i Grønland og samlere verden over.

Korrespondenten har reference til Salgslederen og varetager engelske og tyske oversættelsesopgaver samt behandling af kundeforespørgsler.

Arbejdsopgaverne kan omfatte oversættelse til og fra engelsk og tysk, behandling af kundehenvendelser, registrering og gennemgang af post på diverse sprog, sparringsredaktør på vores medlemsblad Greenland Collector og ad hoc opgaver.

Vi forestiller os, at du har følgende kvalifikationer:
+ Engelsk og tysk i skrift og tale på korrespondentniveau
+ Kendskab til andre fremmedsprog vil være en fordel
+ Fleksibilitet i det daglige arbejde og hurtig omstillingsevne
+ Gode formuleringsevner i dansk, engelsk og tysk, såvel mundtligt som skriftligt
+ Rutineret i Microsoft Word og Excel
+ Rutineret EDB bruger med kendskab til Concorde

Derudover er du selvstændig, er i besiddelse af gode samarbejdsevner, resultatorienteret og initiativrig og i stand til at arbejde under pres.

Stillingen aflønnes i henhold til kvalifikationer. Der kan anvises bolig til stillingen, for hvilken husleje og depositum betales af dig selv efter gældende regler. Der må påregnes vakant indkvartering, indtil første skib ankommer med dit flyttegods til Tasiilaq omkring den 1. juli 2002. Fri til- og fratrædelsesrejser, samt bohaveflytning efter de gældende regler.

Såfremt ovennævnte har din interesse, er du velkommen til at kontakte Frimærkechef Søren Rose (sro@tele.gl) eller Salgsleder Irene Wamming (iwa@tele.gl) på telefon +299 98 11 55.

Skriftlig ansøgning (mærket 18.22/2001.56) vedlagt C.V., kopi af eksamensbeviser og eventuelt referencer, skal sendes til vores moderselskab på nedenstående adresse senest den 19. november 2001.

TELE Greenland A/S
Personaleafdelingen
Postboks 1002
3900 Nuuk
GRØNLAND

For yderligere oplysninger besøg vores hjemmeside:
http://www.stamps.gl